## 1. VÍKINGASANGURIN

*Orð: Essa Jacobsen Lag: Jambalaia*

Vit um Víking nú ein sang vilja syngja
Aðrir tankar mugu okkum ei tyngja.
Fótbóltstos verður prentað í hvørt oyra.
Fara okkar' vallir á, rópa »Koyr á«

Víkingur, Víkingur er besta liðið.
Ei vit geva hinum liðnum nakað av friði.
Tá vit dripla um vøll og taka stigið.
Ei ov nógv tá um víkingar eg sigi.

Tá á Brekku niðan á vøll, so vit fara.
Allir áskoðarar nú skulu læra.
At vit gestirnar ei vilja spara.
So við stigum teir ei til húsa fara.

Vit um Leirvíksfjall til Gøtu so ganga
Ja, tann farleið hevur søguna manga.
Til tann stað har man mangan hevur verið.
Sum frá forntíð hevur itið Sarpugerði.

Út at ferðast fara runt um alt landið.
Nógvum liðum møta tó eingin vandi.
Koyrið á, koyrið á, ja vit tora.
Herja á inntil vit klára at skora.

Tá ið fótbóltsárið er komið at enda.
Eina ítróttarheilsan vit vilja senda.
Næsta ár vit so trúgvir aftur venda.
Og vit vóna tá, at tað fer at henda.

Víkingur, Víkingur er besta liðið.
Ei vit geva hinum liðnum nakað av friði.
Tá vit dripla um vøll og taka stigið.
Ei ov nógv tá um víkingar eg sigi.